**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Endurlýsing

Søkt verður eftir fysioterapeuti við serútbúgving í lymfeødem viðgerð.

Á fysioterapideildini á Landssjúkrahúsinum søkja vit eftir fysioterapeuti, sum hevur útbúgving í lymfeødemviðgerð og áhuga fyri at viðgera sjúklingar við primer og sekunder lymfeødem. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Setan 1. juni 2005 ella eftir avtalu.

Tú verður ein partur av fysioterapeut hópinum á heiliráðdeldini og kemur partsvís at arbeiða á heiliráðdeildini, og partvís við lymfeødemviðgerð saman við verðandi lymfeødemfysioterapeutum.
Á fysioterapideildini eru 11,0 fulltíðarstørv. Yvirfysioterapeutur, deildarfysioterapeutur, fysioterapeutar og sjúkrahjálpari, tilsamans 14 fólk.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta, at tú hevur útbúgving og áhuga í viðgerð av lymfeødem sjúklingum. At tú ert opin, er álítandi, hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvstøðugt.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjun Poulsen, yvirfysioterapeut ella Karin Djurhuus , deildarfysioterapeut, tlf 304599 lok 5790

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fysioterapeufelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Freistin at søkja starvið er 27. apríl 2005 kl 12.00

Skivlig umsókn, merkt »umsókn til starv«, við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Klaksvíkar Sjónleikarafelag

**Aðalfundur verður í hølum felagsins mikudagin 23. mars kl. 20.00**

Skrá sambært lógum felagsins, umframt broyting í viðtøkunum.

**Klaksvíkar Sjónleikarafelag**

# Málningaframsýningin hjá Lions Club Eysturoy

Árliga málningaframsýningin verður 1. og 2. páskadag í Runavíkar skúla.

Áhugaðir luttakarar skulu siga frá seinast 16. mars á telefon nr. 443003, har nærri fæst at vita um treytirnar.

**Lions Club Eysturoy**

# Náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins 2005

Náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins verður í ár latin fyri 11. ferð. Virðislønin, sum er 350.000 d.kr., verður latin privatum ella almennum virki, felagsskapi ella einstaklingi, sum hevur víst serligt virkisfýsni innan náttúru- og umhvørvisvernd.

### Evnið í 2005

**Náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins verður í 2005 latin einstaklingi, vinnuvirki ella felagsskapi í norðurlondum, sum framburðarríkt virkar fyri at gera sjónlig, varðveita, brúka og/ella umsita virðismikil mentanarlandsløg í norðurlondum, soleiðis at øll náttúru- og mentanarvirði verða varðveitt og ment.**

Øll kunnu senda inn uppskot til vinnara. Uppskotið skal innihalda lýsing av arbeiðinum og upplýsingar um, hvør fremur ella hevur framt verkið. Arbeiðið skal hava fakliga góðsku og týdning í breiðum samanhangi í einum ella fleiri av norðurlondunum. Uppskotið skal orðast á í mesta lagi tveimum A4-síðum.

Vinnarin av virðislønini verður útnevndur av eini dómsnevnd, ið hevur umboð úr Íslandi, Noregi, Svøríki, Finnlandi, Danmark, Grønlandi, Føroyum og Álandi.

Uppskotið, ið skal skrivast á eitt serligt skjal, skal vera inni í seinasta lagi **fríggjadagin hin 29. apríl, kl. 12.00.** Skjalið fæst á heimasíðu Norðurlandaráðsins www.norden.org ella við at venda sær til skrivstovuna hjá donsku sendinevndini:

**Nordisk Råd**
**Den Danske Delegation**
**Christiansborg**
**DK 1240 København K**
**Tlf. +45 33 37 59 58, fax +45 33 37 59 64**
**e-mail: nrpost@ft.dk**

# Lærupláss til Kvik køkar

Vit søkja eftir einum handilslærlingi.

Skal helst hava FHS ella HH, men eingin treyt.

Vilt tú vita meir um lærupláss, so ring 312480 ella 512480.

Skrivlig umsókn við ummælum skal sendast til

**Kvik køkssentrið**
Hoyvíksvegur 65
Box 3182
100 Tórshavn

Sosialurin

Rúnavíkar kommuna

**Søkt verður eftir**

# leiðara

**til Frítíðarskúlan í Runavíkar kommunu**

Søkt verður eftir avloysara fyri leiðara í farloyvi 40 tímar um vikuna frá 15. mai 2005 til 30 juni 2006.

Frítíðarskúlin heldur til í gomlu læknahúsunum á Heiðavegi 22, Saltangará. Frítíðarskúlin er normeraður til 30 børn.

Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum. Tað verður væntað av umsøkjaranum, at hann á leiðandi og virknan hátt, saman við starvsfólkunum, heldur fram við at menna frítíðartilboðið. Umráðandi er, at umsøkjarin evnar at ganga nýggjar leiðir, dugir væl at samstarva og er sjónligur í sínum leiðarastarvi.

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, lønt eftir lønarstigi 18 til 24.

Bert umsøkjarar við námsfrøðiligum prógvi ella líknandi kunnu søkja starvið.

Nærri fæst at vita um starvið, við at tosa við Jákup Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000

Umsøkn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Runavíkar kommunu í hendi týsdagin 22. mars 2005, kl 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Postboks 139
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

# Tvingsilssøla

Tvingsilssøla verður av sethúsaognini matr. nr. 218a, Hvalba, fríggjadagin tann 8. apríl 2005 kl. 10.00 í Føroya Fútarætti, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn.

Sethúsini eru 48 fermetrar til víddar.

Húsini standa á festijørð, sum skal frábýtast og keypast sambært tilsøgn frá Føroya Jarðarráði.

Frábýtta grundøkið verður mett at vera umleið 150 fermetrar til víddar og kann yvirtakast fyri 7.950.00 kr. umframt frábýtingarútreiðslur, ómaksløn og tinglýsingargjald.

Ognin verður seld upp á vanligar tvingsilssølutreytir.

**Heygum & Petersen**

i

Sosialurin